

**» Øll kirkjan innan er snøgt sagt avmonterað: Altarið er burtur. Onki sæst til nakran bonk. Sjálvt altartalvan er tikin niður. Á loftinum í erva er urgan dekkað av eini presending**

**NÁGREINILIGT**

*Teir tríggir timburmenninir sýna nærlagni, nú kirkjan skal setast aftur í sama stand sum áðrenn umvælingin byrjaði*

## Fakta

**Mikladals kirkja**

6. juli 1855 er kirkjusýn í Mikladali, og har siga sýnsmennirnir, at kirkjan er í so ringum standi, at hon ikki kann umvælast, og harafturat er hon ov lítil. Teir ráða tí til, at kirkjan verður niðurtikin og nýggj bygd í staðin. Og av kirkjusýninum, sum verið hevur 12. juni 1860 sæst, at nýggj kirkja er bygd í 1859.

Frá aldarskiftinum og fram til 1915 var kirkjan í sera ringum standi. Kirkjusýnini hesa tíðina hava nógvar viðmerkingar um, at so er. Eisini íbúgvarnir í Mikladals sókn gera vart við seg. 26. mai 1909 skriva teir bræv til Færø Amt, har teir greiða frá, hvussu vánaligum standi kirkjan er í.

Aftaná drúgt brævaskifti millum kirkjuráð, próst og amt, m.a. um peningaviðurskifti, verður tó avgjørt at fara undir umfatandi umbygging av kirkjuni.

Í 1915 byrjar umbyggingin, so núverandi kirkja er bert lutvís nýggj. Veggirnir og skjøldrarnir vórðu munandi hækkaðir, jarntak kom á í staðin fyri tað gamla, sum var skifur; hon var klødd innan við viði, og uttan varð hon pussað. Fyrr vóru eingi vindeygu á norðaru síðu, men nú eru 4 størri og 1 minni á hvørjari síðu. Tornið er av timbri, klætt við jarni, og spírið er smíðað úr jarni við vimpli á.

15. desember 1915 varð kirkjan so vígd av Fr. Petersen, prósti. Hjástaddir vóru, umframt bygdafólk, Absalon Joensen, sum eitt skifti var prestur í Norðoyggjum, amtmaðurin og sjefurin á danska sjóverjuskipinum Beskytteren, sum kom norður við próstinum og amtmanninum.

*(KELDA: J. P. Gregoriussen, Eldru Hválvkirkjurnar)*



**STÓRARBEIÐI**

*- Kirkjan er so gott sum nýggj innan, sigur Hanus Højgaard, sum stendur fyri umvælingini av Mikladals kirkju*